## Vóru ávarað um bankan

Danski búskapar- og vinnumálaráðharrin, Lene Espersen, vísir aftur øllum gitingum um, at búskaparmálaráðið var vitandi um ta vánaligu støðuna hjá Roskilde Bank, langt áðrenn tað kom fram alment. Upplýsingar vísa annars, at ein av teimum ovastu embætismonnunum í búskaparmálaráðnum bleiv kunnaður um støðuna hjá Roskilde Bank longu á sumri í 2007. Men Lene Espersen heldur uppá, at búskaparmálaráðið fekk einki at vita fyrr enn í fjør. Ein advokatur skal nú kanna, hvat búskaparmálaráðið og táverandi ráðharrin, Bendt Bendtsen, fingu at vita í 2007.




## Mist Nobel-heiðurstekin

Myndugleikarnir í Iran hava lagt hald á heiðurstekinið, sum mannarættindastríðskvinnan Shirin Ebadi fekk, tá hon varð heiðrað við Nobel-friðarheiðurslønini í 2003. Heiðurstekinið lá í einari bankaboks í Teheran, men hvarv haðani fyri trimum vikum síðani, skrivar NTB. Norska uttanríkisráðið sigur, at hetta er tann fyrsti tilburðurin av hesum slagnum nakrantíð. Shirin Ebadi ivast ikki í, at hon verður revsað, tí hon fanst at viðferðini, sum mótmælisfólk í Iran fingu aftan á valið í summar. Sjálv fór hon úr Iran beint fyri valið, og hon er ikki farin heimaftur enn, skrivar NTB.



*Her á altanini endaði molotov-cocktailiurin, sum sambært ákæruvaldinum kundi havt endað við álvarsligari vanlukku, men sum sambært verjunum ongan vanda hevði við sær*

*Mynd Jens Kristian Vang*

Eldáseting:

# Ósemja um dómin

**Prosedura var í gjár í rættarmálinum móti tveimum unglingum, sum eru ákærdir fyri at hava sett eld á eini hús við at tveita ein sonevndan molotov-cocktail upp á altanin á einum húsum í Havn. Ákæri og verjar vóru rúkandi ósamdir um, hvussu dómurin skuldi falla**

ELDÁSETING

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

9. mai í fjør, bara ein tíma inn í døgnið, tveittu tveir unglingar eina flósku upp á altanina á húsunum á Jansstovugøtu 4 í Havn. Fyri løgregluni greiddu teir báðir dagin eftir hendingina nágreiniliga frá, hvussu teir høvdu framleitt eina molotov-cocktail og tveittu so henda upp á altanina á nevndu húsum.

Cocktailin festi í, men hvør ætlanin við hesum var, og hvussu vandamikil støðan í heila tikið var hesa náttina, eru ákærin, Julia Dahl og verjarnir hjá teimum báðum ákærdu, Peter Even Djurhuus og Julianna Klett, rúkandi ósamd um.

Prosedura var í Føroya Rætti í gjár, og tað var ákærin, sum legði fyri.

Julia Dahl er vikarierandi hjá ákæruvaldinum í Føroyum, og hon førdi hesa sakina fyi ákæruvaldið.

Hon helt tað vera eitt »páfaldende hukommelsessvigt«, at teir báðir ákærdu so at siga einki mintust til hendingina, tá teir vóru avhoyrdir í Føroya Rætti. Hetta samanhelt hon við heilt ítøkiligu og í smálutum givnu frágreiðingarnar, sum standa í politirapportunum.

Teir báðir unglingarnir, nú 19 og 20 ára gamlir, eru ákærdir eftir §§ 180, 181 og 252. §180 er sera álvarsom, og umfatar við vilja at hava sett eld á lut, og harvið við vilja at hava komið mannalívi í álvarsligan lívsvanda. §181 er mildari, men umrøður eisini eldáseting. § 252 er um at koma mannalívi í vanda.

### Ætlanin týðilig

Julia Dahl helt seg til politirapportirnar í størsta mun, og tað skein týðiliga ígjøgnum, at hon á ongan hátt trúði teimum ákærdu, tá teir søgdu seg einki minnast. Hinvegin helt hon fast við, at báðar treytirnar í §180 um at eldurin var ásettur við vilja, og at eldurin var av slíkum slag, at hann ikki slóknaði av sær sjálvum, báðar vóru uppfyltar.

Flammurnar vóru millum ein og hálvanannan metur høgar sambært vitnunum, teimum báðum, sum búgva í húsunum, og tað helt ákærin var týðiligt prógv um, hvussu álvarslig støðan var.

- Einasta orsøkin til, at tað ikki endaði heilt galið var, at konan vaknaði og varnaðist eldin, og fekk vakt manin, sum síðani fekk sløkt, segði Julia Dahl.

Hon vísti eisini til politirapportina, har teir báðir í smálutum greiddu frá, hvussu teir høvdu framleitt molotov-cocktailin. Tað gekk týðiliga fram, at talan var um eina Chocio-fløsku, sum molotov-cocktailurin varð gjørdur í. Báðir greiddu teir frá, at teir tømdu ein terpentindunk í áðurnevndu Chociofløsku, stungu avíspappír í hálsin og síðani settu eld á.

Ákærin helt, at tá nakað so detaillerað sum Chociofløskan var nevnd í politirapportini, so máttu teir ákærdu havt eina rættiliga detailjeraða frágreiðing til løgregluna hendan dagin eftir – ella seinni sama dag, sum tað í veruleikanum var.

Julia Dahl vísti eisini á, at grannin og tann eldri ákærdi ikki sótu væl um sátt, og at politirapportin týðiliga segði, at teir báðir ákærdu vildu geva grannanum ein hvøkk.

Hon kveistraði av borðinum frágreiðingina hjá teimum ákærdu í rættinum um, at teir bert vildu bróta fløskuna í túninum fyri at geva grannanum ein hvøkk.

- Hvussu kann ein brandbumba hvøkka nakran, tá hon skal tveitast í túni hjá einum persóni mótsattu megin húsunum, har viðkomandi svevur, spurdi ákærin.

Eisini vísti ákærin á, at um ætlanin ikki hevði verið at tveitt brandbumbuna upp á altanin, hví flýddu teir ákærdu so avstað, tá tað einasta rætta í slíkum føri hevði verið at boða teimum órættaðu frá, at eitt óhapp var hent.

### Prógvini bera ikki

Ákærin hjá tí yngra ákærda, Peter Even Djurhuus, talaði væl fyri sínum klienti. Hann metti ikki, at prógv var ført fram fyri, at hansara klientur uppfylti treytirnar í hvørki § 181 ella § 252. Ikki óvæntað tulkaði hann hesar báðar paragraffirnar heilt ørvísi enn ákærin.

Petur Even Djurhuus vísti eisini á, at tað gingu bert tríggir minuttir frá tí, at konan í húsinum ringdi 112 og boðaði frá eldinum, til hon ringdi aftur og segði, at eldurin var sløktur.

- So talan kann ikki hava verið um serliga stóran og álvarsligan eld, metti Petur Even Djurhuus.

Hann vísti eisini á, at boðini í samrøðuni til 112 vóru, at »tað brennir eitt sindur« á altanini.

Hann nýtti eisini nógva orku at vísa á, at tað funnust eingi ítøkilig prógv fyri, at tað var terpentin, sum var í fløskuni, og somuleiðis var einki ítøkiligt prógv fyri, at hansara klientur við vilja hevði kastað fløskuna upp á altanina.

- Tað telur ikki sum prógv, at ákærin pástendur, at »sund fornuft« sigur nakað, segði Peter Even Djurhuus.

Samanum tikið metti verjin ikki, at nakar vandi hevði verið á ferð, og hann mælti tí til frídøming av sínum klienti, ella í øðrum lagi ein linan dóm.

Juliana Klett, sum var verji hjá eldra unglinganum mælti somuleiðis til frídøming. Hon royndi eisini at sannføra dómaran uml, at teir báðir ikki høvdu sett lívið hjá nøkrum í vanda, og at hetta bert vóru dreingjalótir við óhepnum enda.

Hon tók undir við tí, sum Peter Even djurhuus førdi fram og mælti sum nevnt til, at hennara klientur varð frídømdur.

Ein mentalkanning av eldra ákærada er á veg, og tí var tað bert skuldarspurningurin, ið var til viðgerðar í gjár og ikki ein møguligt longd av revsingini. Mentalkanningin er ikki liðug enn, men væntandi fellur dómur í málinum í næstu viku.